SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Jonathan Motzfeldt er prestur, og so leingi hann ikki er dømdur fyri nakað, kunnu vit einki gera*

*(Sofie Petersen, biskupur)*

# Fimm ára gamla Mari Luz er horvin

**Sunnudagin fekk Mari Luz eina evru at keypa sær góðgæti fyri, men hon kom ongantíð aftur úr kioskini**

Spania hevur nú fingið sítt Madeleine-mál. Sunnudagin hvarv tann fimm ára gamla Mari Luz í Torrejónbýarpartinum í býnum Huelva. Síðani hava skyldfólk, vinir, kenningar og fleiri hundrað løgreglumenn leitað við servandum hundum, men til fánýtis. Mari Luz er ikki at finna.

Málið hevur vakt serligan ans, tí Huelva er ikki langt frá portugisiska býnum Praia da Luz, har enska Madeleine McCann hvarv tann 3. mai í fjør, og spanska løgreglan hevur eisini kunnað portugisisku løgregluna um málið.

Pápi Mari Luz, Juan José Cortez, er prestur, og hann heldur tað ikki vera óhugsandi, at onkur hevur burturflutt gentuna við tí fyri eyga at krevja loysigjald fyri at lata hana leysa. Løgreglan í Huelva sigur seg hava illgruna um, at gentan kann verða burturflutt sum hevnd ímóti einum skyldfólki hennara, men tað málið er ikki liðugt kannað.

Løgreglan hevur fingið nakrar frágreiðingar frá fólki, sum halda seg hava sæð okkurt óvanligt. Tann mest sannførandi frágreiðingin er frá einari kvinnu, sum helt seg síggja Mari Luz saman við einari kvinnu í einum bussi. Kvinnan sat undir gentuni, sum græt. Løgreglan hevur avhoyrt bussføraran, men hann dugdi ikki at minnast nakað óvanligt.



*Mari Luz fór í kioskina at keypa góðgæti sunnudagin. Hon kom ikki aftur*

*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Ósamdir um valdið

Í iraksku stjórnini eru menn so ósamdir, at teir kunnu eitt nú ikki semjast um, hvør teirra eigur geva boð um at avrætta fangar, sum eru dømdir til deyða. Í løtuni sita tríggir menn í fongslinum og bíða eftir at verða avrættaðir. Ein teirra er Kemiski Ali, systkinabarn Saddam Hussein, og sum er dømdur til deyða fyri krígsbrotsverk av ringasta slagi. Hinir báðir eru ein fyrrverandi verjumálaráðharri og ein fyrrverandi herovasti, sum eru dømdir til fólkadráp. Irakski hægstirættur staðfesti í september í fjør deyðadómarnar ímóti teimum trimum monnunum, og eftir stýrisskipanini skulu dómarnir fullførast í seinasta lagi 30 dagar aftaná staðfestingina. Men teir tríggir eru á lívi enn, tí ráðharrarnir í stjórnini kunnu ikki semjast um, hvør eigur at geva boðini um at taka teir av søgum, skrivar AP.

### Aftur McCain

Tað er líkt til, at tey fremstu republikonsku valevnini skiftast um at vinna uppstillingarvalini í USA. Fyrst vann Mike Huckabee í Iowa, so John McCain í New Hampshire og seinast Mitt Romney í Michigan. Nú benda meiningakanningarnar á, at McCain fer at vinna næsta valið, sum verður í Suður Karolina leygardagin. Hann fær 29 prosent, Huckabee 23 og Romney 13.

### Oprah egna rás

Næsta ár sleppa 70 milliónir húsarhald í USA at síggja eina nýggja sjónvarpsrás, sum fær heitið Oprah Winfrey Network, og sum navnið sigur, er tað sjónvarpsstjørnan Opra Winfrey, sum er stigtakari. Hon skal eiga rásina saman við stórfyritøkuni Discovery Communications. Í einum tíðindaskrivi sigur Oprah Winfrey, at tey seinastu 15 árini hevur tað verið hennara stóri dreymur at fáa sína egnu sjónvarpsrás, og at hon gleðir seg til, at tað nú verður veruleiki.

### Afghanar høvdu ábyrgdina

Norski uttanríkisráðharrin, Joan Gahr Støre, heldur ikki, at tað ber til at lasta norsku trygdarmyndugleikarnar fyri tað, sum hendi á Serenahotellinum í Kabul, har ein norskur tíðindamaður varð skotin. Norskir fjølmiðlar hava róð uppundir, at norsku myndugleikarnir tóku ikki trygdina í nóg stórum álvara, men tað avsannar Jonas Gahr Støre.

- Teir afghonsku myndugleikarnir høvdu ábyrgdina av trygdini, sigur hann við Aftenposten. Hann leggur tó afturat, at uttanríkisráðið og trygdartænastan fara at eftirmeta tað, sum hendi í Kabul.

# Stórt endurgjald fyri oljudálking

**Franska oljufelagið Total er dømt at gjalda hálva aðru mia. krónur í endurgjaldi fyri vanlukkuna, tá Erika sakk í Biscayavíkini í 1999**




*Erika sakk úti fyri fronsku strondini í desembur í 1999*

*(Mynd: Polfoto)*

Tað gjørdist tann higartil ringasta oljudálkingin í Fraklandi, tá tangaskipið Erika fór á land við Biscayavíkina í desembur í 1999. Millum 20.000 og 30.000 tons av olju runnu út í havið, og umleið 75.000 sjófuglar doyðu.

Myndugleikarnir og fleiri feløg kravdu endurgjald frá oljufelagnum Total, og fyrradagin fall dómur í rættinum í París. Í fyrra lagi bleiv felagið dømt at rinda franska ríkiskassanum umleið 2,7 mió. krónur í bót fyri at hava dálkað sjógvin, og í øðrum lagi varð felagið dømt at gjalda umhvørvisfeløgum, hotellum, gistingarhúsum og øðrum 2,5 mia. krónur í endurgjaldi.

Rætturin kom til ta niðurstøðu, at Total átti at verið vitandi um, at tangaskipið var 25 ára gamalt, og at viðlíkahaldið hevði verið ógvuliga tilvildarligt.

Dómurin fekk alt fyri eitt ávirkan á partabrøvini í Total, sum fullu umleið tvey prosent á virðisbrævamarknaðinum í París.